## Heldur Helle

Ein fjórðingur av teimum donsku veljarunum høvdu væntað sær meiri av Lars Løkke Rasmussen sum forsætisráðharra, enn hann hevur víst, síðani hann tók við í fjør. Ein meiningakanning, sum Ritzau hevur latið gera, vísir, at 24,3 prosent eru misnøgd við avrikini hjá forsætisráðharranum, meðan 11,4 prosent siga. at hann hevur staðið seg betur, enn tey høvdu væntað. Av teimum spurdu siga 41 prosent, at hann er tann rætti stjórnarleiðarin, men 45 prosent siga, at tey vilja hevur hava Helle Thorning-Schmidt.



## Eykakonsert við Hanusi G

Ovurstórur eftirspurningur er orsøkin til, at Hanus G. bjóðar til eykakonsert í sjónleikarhúsinum í Havn hóskvøldið. Konsertin mikukvøldið, har Hanus framførir nýggir sangir til yrkingar hjá Poul F., er útseld. Men, vegna stóran áhuga er avgjørt, at eykakonsert verður í sjónleikarahúsinum hóskvøldið klokkan 20. Pláss er einans fyri 150 gestum í sjónleikarahúsinum, har lagt er upp til eina serføroyska konsert við Hanusi saman við Mikael Blak á bassi og Magnusi Johanessen á tangentum. Atgongumerki til eykakonsertina eru at fáa í tónleikahandlinum hjá Tutl á Káta horninum í Havn.

# Flestu prestarnir víga fráskild

**Fýra av hvørjum fimm prestum í Føroyum eru fyri at víga fráskild**

FÓLKAKIRKJAN
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Seinastu árini eru komnir nakrir prestar, sum taka sær av rættinum, ið teir hava, til at nokta at gifta upp aftur fólk, sum eru fráskild.

Nógv orðaskifti hevur verið um hetta, nú seinast innsetti presturin alment hevur boðað frá, at hann ikki vil víga fráskild.

Sosialurin hevur spurt flestu prestarnar í landinum, hvat teir siga til henda spurning.

Prestarnir, sum ikki hava trupulleikar við at víga fráskild, aftra seg ikki við at siga tað. Onkur sigur seg gera tað gjarna, nakrir siga, at teir eru ikki settir at vera dómarar, og at ta, sum um ræður er, at hjún eru góð við hvørt annað.

Teir prestarnir eru: Jógvan Fríðriksson, bispur, Uni Næs, dómpróstur, Jónsvein Bech, Meinhard Bjartalíð, Inga Poulsen Dam, Jákup Reinert Hansen, Martin Restorff Jacobsen, Elsa Funding, Heri Joensen, Sonja Klein, Patrick de Neergaard, David Johannesen, Magnus Brahé Jørgensen, Ann Dahl Hansen og Theodor E. D. Olsen.

Emil Olsen er burturstaddur. Sum skilst vígir hann eisini fráskild.

Hvørja støðu Hanus á Gørðum hevur, er ógreitt, tí hann hevur ikki verið at hitt í dag.

Bergur Debes Joensen vil ikki svara, tí hann sigur tað vera eitt innanhýsis mál í kirkjuni.

Sverri Steinhólm vil heldur ikki svara.

Derhard Olsen segði greitt í útvarpinum, at hann ikki vígir fráskild.

Símun P. Jacobsen dámar einki henda spurning.

– Eg havi onga viðmerking til slíkt tvætl, sigur hann.



*Teir flestu prestarnir siga seg einki hava ímóti at gitfa upp aftur fólk, sum eru fráskild*

# Helena skal svara

**Í dag skal Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna svara einum fyrispurningi frá Torbjørn Jacobsen, um hon er sinnað at broyta kunngerðina, so prestar ikki kunnu bera seg undan at víga fráskild**

FÓLKAKIRKJAN
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Sosialurin royndi í dag at fáa eina viðmerking frá Helenu Dam á Neystabø, landsstýriskvinnu um kunngerðina, ið heimilar prestum at nokta at víga fráskild. Ella um hon heldur kunngerðina vera í lagi.

- Hasin spurningurin er ikki so einfaldur, tí eg havi fingið upplýst, at tað ikki er sum at siga tað at broyta eina kunngerð. Eg má seta meg væl og virðiliga inn í málið, segði Helena Dam á Neystabø, sum lovaði at venda aftur til málið seinni.



*Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna, sleppur í dag í tinginum at svara einum fyrispurningi, um hon vil broyta regluverkið, so prestar ikki kunnu bera seg undan at víga fráskild*

Men í morgun sleppur hon ikki undan at svara, tí Torbjørn Jacobsen hevur sett henni ein hvassorðaðan spurning um málið.

Hann vil fyrst og fremst hava at vita, hvørja støðu hon hevur í málinum.

Harnæst spyr hann, um kirkjumálaráðharrin kann góðtaka, at almennir tænastumenn undir Mentamálaráðnum smalka gáttina til kirkjuna.

- Ætlar landsstýrismaðurin at gera broytingar í regluverki og kunngerðum, soleiðis at henda "missiónska" herferðin" steðgar, spyr Torbjørn Jacobsen.

## Prestar kunnu nokta

**Ein prestur hevur fullan rætt at nokta at víga fráskild**

FÓLKAKIRKJAN
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Eftir at nýggjast innsetti presturin í Føroyum, Derhard Olsen, leygarkvøldið í útvarpinum segði, at hann ikki vildi víga fráskild, hevur nógv orðaskifti verið um henda spurning.

Mánakvøldið segði Jógvan Fríðriksson, bispur við útvarpið, at hann hevði einki ímóti sjálvur at víga fráskild, men hann hevði onga heimild til at áleggja øðrum prestum at gera tað sama. Sambært kunngerð hava prestarnir rætt til at nokta, segði bispur.

Kunngerðin, sum bispur vísti til, er kunngerð nr. 43 frá 25. januar 2002 fyri Føroyar um kirkjuliga vígslu í fólkakirkjuni.

I øðrum kapitli, §2 stk. 5 stendur m.a.

....Præsten kan dog nægte at vie en fraskilt...